


Sosialurin FØROYABANKI




**Ársfundurin verður í Miðlahúsinum mikukvøldið 27. mai klokkan 19:30.**

**SKRÁ:**

- Ársfrágreiðing og myndafrásøgn frá ferðini í Liberia
- Tórhild Bjarkhamar luttekur við sangi

Eisini verður møguleiki at tekna seg sum stuðul hjá barni.
Eftir fundin fæst ein drekkamuður og okkurt gott afturvið.

***Øll eru hjartaliga vælkomin.***




Tórsgøta 1 · Tel 34 18 00 · Fax 34 18 01
post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo

miðlahúsið í Vágsbotni

# Skúlin við Løgmannabreyt søkir eftir varaskúlastjóra

## Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum:

- undir ábyrgd og í samstarvi við skúlastjóran skal vera við í teirri fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluni viðvíkjandi virksemi skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við skúlastjóran og eftir fyriskipan hansara.

## Harumframt skal varaskúlastjórin

- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans
- saman við skúlastjóranum átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- hava ábyrgdina av leiðslu skúlans, tá ið skúlastjórin er burtur
- vera førur at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd.

## Førleikakrøv

Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

## Vit bjóða

Eitt sera spennandi starv við nógvum fjølbroyttum uppgávum og avbjóðingum í gerandisdegnum. Tú gerst partur í einum leiðslutoymi, har tað námsfrøðiliga arbeiðið verður raðfest frammarlaga. Eisini eru góðir møguleikar fyri fakligari menning og eginmenning.

## Setanar- og lønartreytir

Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Skúlanum við Løgmannabreyt. Tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokkinum 33.1 sambært avtalu, dagfest 30. mai 2008, millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skyldiga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

## Umsóknir

Umsókn, við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum, skal vera í Skúlanum við Løgmannabreyt, Postboks 3174, 110 Tórshavn í seinasta lagi fríggjadagin 12. juni 2009 kl. 16.00.

## Meir at vita

Tey, ið vilja fáa meiri at vita um starvið, kunnu ringja til Høgna Joensen, skúlastjóra, á tel 214109 ella umvegis teldupost hogni.joensen@skulin.fo

SKÚLIN VIÐ LØGMANNABREYT

Skúlin við Løgmannabreyt verður ein 2-sporaður skúli úr 1. upp í 9. fl. og verður tikin í nýtslu í stigum. Næsta skúlaár verða umleið 225 næmingar úr 1. upp í 7. flokk, og í skúlanum fara at starvast 20 lærarar og 2 stuðlar.